## Flaggdagsrenning í Vági

Skipað verður fyri flaggdagsrenning í Vági flaggdagin. Hetta er fyrstu ferð, at skipað verður fyri flaggdagsrenning í Vági. Tað er Ítróttarfelagið "Hvistan", ið skipar fyri tiltakinum. Byrjað verður við Framtíðina kl. 13.30, har luttakararnir eisini møta. Runnið verður oman á niðaraveg, vestur í Bø og rundan um vatnið, niðan við hjá Eyðfinn Mørk og niðan á Foss, út í Toftar og oman ígjøgnum Toftabrekku, út á vendiplássið á Gartnaroyri og síðan eftir niðaraveg vestur aftur til Framtíðina. Strekkið er uml. 5 km. Børnini renna bert hálvan teinin. Kappingin er fyri børn og vaksin. Gjørt verður vart við, at øll – ung og eldri, skjót og minni skjót – eru vælkomin. Fólk vælkomin at ganga allan teinin. Tá komið er á mál, fáa allir luttakararnir frukt, sunkist og kaffi, og heiðursmerki verða latin teimum trimum fremstu rennarunum í hvørjum bólki.

## James setti met

David James setti um vikuskiftið nýtt met í ensku Premier League. Hetta var nevnliga 142. ferðin, at David James helt málið reint í Premier League. Undan hesum átti fyrrverandi Arsenal-málverjin, David Seaman, metið. David James hevur vart málið fyri Watford, Liverpool, Aston Villa, West Ham, Manchester City og Portsmouth, har hann nú spælir.




GÍ-Skála 0-3 (0-2):

# Fín føðingardagsgáva í Gøtu

GÍ

Skála

**Men nýggi Skála venjarin var ikki hjástaddur, tá ið hansara menn vundu burturúr óvanliga illa uppløgdu gøtumonnunum**

FÓTBÓLTUR
*Jóannes Hansen*
*joannes@sosialurin.fo*

Hann kom, hann sá og hann sigraði. Soleiðis plagar at verða tikið til. Í síðstu viku var venjaraskifti á Skála. Stóra idolið á Skála, John Petersen, er nýggjur venjari. Men John er ikki komin til Føroya fyrrenn í dag. Tað vil við øðrum orðum siga, at hann hvørki var komin ella sá, tá ið hansara menn sunnudagin í Sarpugerði vunnu 3-0 og harvið tryggjaðu sær fyrstu stigini á árinum.

Tað var vorðið sum føðingardagsgáva hjá John Petersen, sum sjálvan debut dagin sum venjari fylti 35 ár.

### Ruddaðu beinanveg

Tá ið eitt lið einki stig hevur fingið burturúr fýra ferðir 90 minuttir, ber tað illa til at siga, at ein sigur er lætt vunnin. Men tað hoyrir við til søguna, at gøtumenn vóru lítið uppsettir og óvanliga døllutir. Kanska spøkti flaggdagurin, sum er mikudagin. Tá skal GÍ á heimavølli spæla fjórðingsfinalu í steypakappingini ímóti KÍ.

Tónin varð sligin ann, áðrenn tíggju minuttir vóru farnir. Útlendsku álopsspælararnir drógu tagaðu við renningum miðverjuna hjá heimaliðnum sundur, og so bar til hjá Pæturi Dam Jacobsen, sum hesa ferð var sentralur miðvallari saman við Levi Hanssen, smekkaði til úr átjan metrum, og so lá bólturin í málinum aftanfyri Geza Turi.

Tað var ikki frítt, at tað sást aftur á uppstillingini, at Skála hevði skift venjara. Pauli G. Hansen er framvegis so mikið illa fyri, at hann ikki er førur fyri at spæla alla tíðina. Hann varð skiftur inn miðskeiðis í 2. hálvleiki.

Skála bossurin, Hans Jákup Andreasen, er gamal venjari. Hesa ferð hevði hann ábyrgdina av liðnum, og hann vísti fleiri av monnunum, sum hava verið marginalspælarar álit. Teitur R. Joensen var á vongverjanum í høgru, og Poul N. Poulsen var á plássinum frammanfyri hann.

Mest merkisverda skiftingin á Skála var tað, at hesa ferð fekk blaðungi Hans Jørgensen, sum hevur verið á yngru landsliðunum,



*Skálamenn komu loksins á talvuna. Í fimtu royndini gjørdist tað til sigur, tá teir vunnu sær trý mál og trý stig í Gøtu*

møguleikan millum stólparnar. Gøtumenn settu hann ikki á serliga stórar royndir. Men talan var sjálvandi um fínan debut, tí ungi maðurin megnaði at halda tætt.

### Vorðið sum útgangsstøða

Leiðslumálið tíðliga í 1. hálvleiki bar við sær, at Skála kundi dúva upp á snarálopini, sum teir í fleiri ár hava verið meistarar í.

Skálamenn hildu GÍ liðformannin, Sámal Joensen, í ógvuliga stuttum tjóðri. Hinir GÍ miðvallararnir megnaðu ikki tyngdina, sum skal til, og tá ið vongverjarnir eisini høvdu ilt við at taka lut í uppspælinum, bar tað við sær, at tað ofta gjørdist lítið samanhangandi og tannleyst.

Tá ið Skála stutt undan hvíldini økti um leiðsluna til 2-0, kendist tað sum um, at avgerðin var fallin um, hvør skuldi vinna stigini. Alexandur Johansen, sum eftir drúgvan skaðasteðg í fjør alt meiri líkist tí góða gamla Alexanduri, var miðskeiðis á vøllinum, tá ið hann í júst røttu løtu slepti bóltinum fram um GÍ verjuna til Levi Hanssen, sum sneiddi framvið málverjanum, áðrenn hann trillaði bóltin í tóma málið, og so var fagnaðurin stórur á norðaru langsíðuni og millum Hans Jákup Andreasen og hansara menn á beinkinum.

GÍ megnaði ikki at seta meiri damp undir ketlarnar eftir steðgin. Heimaliðið hevði bóltin nógv, men teir vóru tannleysir, og ofta taptu teir næstdystirnar og stríðið um returbóltarnar.

### John lendir í dag

At ferðin ikki var serliga stór, løgdu gestirnir vertin á. Pauli G. Hansen styrkti um fyritreytirnar at varðveita bóltin, tá ið hann kom á vøllin, og í yvirtíðini megnaðu teir av staðfesta rimmar sigurin. Geza Turi bjargaði í fyrstu atløgu, men Alexandur Johansen var fyrri á returinum enn ikki serliga uppsettu gøtumenninir, og so var støðan 3-0 til Skála. Støðan í sambandið við triðja málið, ið varð skorað í yvirtíðini, var góð mynd av hugburðinum og avrikinum hjá heimaliðnum.

Í dag er John Petersen komin til Skála, og hann kann staðfesta, at tað var vorðin sum føðingardagsgáva, sum Hans Jákup Andreasen og spælararnir sunnudagin gávu honum.

## Endaliga støðan í finaluni

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Marner Joensen - Arnbjørn Sivertsen | 90 |
| 2 | Bogi Simonsen - Hallberg Arnfríðsson | 48 |
| 3 | Heðin Mouritsen - Jóannes Mouritsen | 35 |
| 4 | Hans Jacob Petersen - Niels Nielsen | 33 |
| 5 | Allan Dal-Christiansen - Robert Langgaard | 30 |
| 6 | Per Kallsberg - Dánjal P. Mohr | 17 |
| 7 | Jens Pauli G. Nolsøe - Danny Danielsen | 14 |
| 7 | Atli Hansen - Jógvan Ranghamar | 14 |
| 9 | Oddmar Danielsen - Einar Ellingsgaard | 8 |
| 10 | Salomon Johansen - Sakaris Joensen | 1 |
| 11 | Henriette Svenstrup - Bjørg Róin | -18 |
| 12 | Finn Ougaard - Høgni Jacobsen | -20 |
| 13 | Øssur Winthereig - Ingolf S. Olsen | -33 |
| 14 | Símin Hansen - Hanus Bærentsen | -46 |
| 15 | Heini Joensen - Hans J. Poulsen | -55 |
| 16 | Ásla Weihe - Hallgerð Hansen | -118 |

## Spæl

**Í umfarinum móti Niels Nielsen og Hans Jacob Petersen hevði eg hesa hondina, ið eg hevði trupulleikar at melda.**

**S/NS**
N E S V
!ut p p ?

1ut – 15-17 hp.

**Mín honda sá soleiðis út:**

Sp EKD9865
Hj KB
Rú K3
Kl K6

**Hvat er besta meld. Eg hugsaði um at melda:**

Pas
Dbl, ið lovar 15+
4sp
3ut.

Eg valdi at doubla og vónaði at makkarin segði pass, men hann meldaði 2hj. Nú royndi eg við 2sp, sum gjørdist endaliga meldið. Eg fekk 10 stik, sum øll tey, ið høvdu melda 4sp.

Um tit hava okkurt gott boð um, hvussu hondin kann meldast hevði tað verið eitt fínt kjakevni á www.bridge.fo.